## Sansir 10 fólk í Danmark



Eftir hálvum øðrum ári er starvsfólkatalið á deildini hjá Sansum í Danmark vaksið úr 2 upp í 10. - Tað gongur so skjótt í løtuni, at Sansir helst í komandi ár fer at vaksa úr 185 fermetra stóru hølunum í Toldbodgade í Nyhavn. Tí leita tey eftir størri hølum, sum helst skulu liggja í miðbýnum í Keypmannahavn. Á myndini eru, aftast frá vinstru: Kim Brockie, mediagrafikari, Joanne Hummerston, sniðgevi, Jacob Mohr Hansen, ráðgevi, Thomas Altamirano, sniðgevi og Dánial Hoydal, tekstahøvundur. Niðast frá vinstru: Rune Galschiøt, leiðari í Danmark og Puk Dyrby, sniðgevar, Rúni Hansen og Svanna H. Joensen. Á myndini væntar Bjørg Mohr Johnson, lýsingaráðgevi.

## Brennievni úr tara

Oljufelagið Shell hevur gjørt av at fara undir royndir at framleiða brennievni burtur úr tara. Í tí sambandi hevur Shell stovnað felagið Cellana, sum hevur høvuðsstøð á Hawaii-oyggjunum, har royndirnar verða gjørdar í samstarvi við eina rannsóknarstovu í oyggjunum. Hetta er ikki tann fyrsta royndin at brúka tara til brennievni. Amerikanarar royndu í áttatiárunum, men teir góvust og valdu ethanol ístaðin fyri. Men Shell sigur seg hava góðar vónir.

# inkar samlaða veiðivirði



*Bjarni Arnason við roknskapargreiningini yvir føroyska fiskiskipaflotan, sum hevur verið partur av hansara arbeiði seinastu árini. Í dag klokkan 14 verður framløga av greiningini í hølunum hjá grannskoðarafelagnum Rasmussen & Weihe. Hetta er ikki ein almenn framløga, men í fyrsta lagi ein framløga fyri viðskiftafólkum felagsins*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

verður á leið tað sama sum undanfarna ár, sigur felagið.

### Rækjuskip

Tað er einki nýtt í roknskapargreiningini, at støðan hjá rækjuskipaflotanum, sum eftir er, ikki er serliga góð.

- Rækjuskipaflotin hevur havt nógv trupul ár á rað, og støðan er sum heild vánalig við árslok 2006.

Í løtuni eru trý rækjuskip í vinnu undir føroyskum flaggi.

- Sambært tølum hjá FF er miðalprísurin fyri kilo fyrstu 9 mánaðirnar í ár lækkaður í mun til somu tíð í 2006. Hinvegin er veiðinøgdin vaksin, og okkurt er, sum bendir á, at rakstrarfyritreytirnar hjá rækjuskipaflotanum eru batnaðar nakað í 2007, sigur felagið.

### Verksmiðjutrolarar

Støðan hjá verksmiðjutrolarunum er rímiliga góð, og skipini eru hampiliga væl fyri við árslok í 2006.

- Verksmiðjutrolararnir hava havt rímiliga góð ár. Hóast broytingar í miðalprísi seinastu 5 árini, hevur raksturin kortini verið støðugt góður. Prísvøkstur hevur uppvigað minkingina í veiðinøgd árini 2003-2005.

Væntandi er, at veiðinøgdin minkar nakað í 2007, men miðalprísurin økist.

- Vit vænta tí, at samlaða veiðivirði hjá verksmiðjutrolarum verður á leið tað sama í 2007 sum árið fyri, sigur Rasmussen & Weihe.

### Partrolarar

Partrolaraflotin er enn hampiliga væl fyri, men fíggjarstøðan versnaði munandi árini 2002-2004. Miðalprísurin, sum hevði verið støðugt fallandi síðan 2002, stabiliseraði seg í 2005 og vaks við heili 32,3% seinasta árið. Saman við munandi øking í veiðinøgdini merkti hetta, at úrslitið hjá partrolarunum broyttist frá halli í 2004 til avlop í 2005 og 2006.

- Veiðinøgdin fyrstu 9 mánaðirnar í ár er minkað í mun til somu tíð í fjør, men miðalprísurin í sama tíðarskeiði er hækkaður. Samanlagt er veiðivirðið, sambært tølum hjá FF, kortini minkað við 12,8% í 2007.

Felagið roknar tí við, at raksturin hjá partrolarunum verður nakað verri í ár enn í fjør, og ein partur av orsøkin er høgu oljuprísirnir.

### Lemmatrolarar

Eins og hjá partrolarunum, er fíggjarstøðan hjá lemmatrolarunum hampilig, og konsolideringin er á góðari leið. Lemmatrolarar eru teir, sum vit undir einum plaga at rópa djúpvatnstrolarar.

- Gjaldførið er batnað fyri hvørt ár og er eisini nøktandi fyri 2006.

Lemmatrolararnir hava klárað at havt ein rímiliga javnan rakstur fram til 2003, men í 2004 hevði skipabólkurin eina munandi afturgongd. Minking í veiðinøgd og miðalprísi frá 2005-2006 merkti, at úrslitið hjá lemmatrolarum aftur vendist til hall.

- Sambært tølum hjá FF hava lemmatrolarar havt eina afturgongd í veiðinøgd fyrstu 9 mánaðirnar í ár upp á 17% samanborið við somu mánaðir í fjør. Aftrat hesum er miðalprísurin eisini lækkaður nakað. Samanlagt er veiðivirðið 9 teir fyrstu mánaðirnar í ár minkað við 13,1%.

Havandi høgu oljuprísirnar í huga, sum hála í skeiva endan, væntar Rasmussen & Weihe, at raksturin hjá lemmatrolarum verður lakari í 2007 enn í 2006.

### Línuskip

Línuskipini høvdu ein støðugan vøkstur fram til 2003, sum gjørdist eitt serstakliga gott ár hjá hesum skipabólki. Positiva gongdin vendist í 2004, og gjørdist samlaða úrslitið fyri 2005 eitt hall á sama støði sum árið fyri.



*- Í flestu skipabólkum eru hýruútreiðslurnar øktar seinastu árini, sigur grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

- Í 2006 høvdu línuskipini stór hall, hóast miðalprísurin hækkaði í 2005 og 2006 eftir støðugt fall árini 2002-2004.

Samlaða veiðinøgdin hjá línuskipum minkaði við 4% árini 2005-2006.

- Sambært FF hava línuskipini havt eina afturgongd í veiðinøgd upp á heili 16,5% fyrstu 9 mánaðirnar í ár í mun til somu tíð árið fyri. Miðalprísurin er hækkaður nakað, soleiðis at samlaða veiðivirðið bert er minkað 6,5%.

Rasmussen & Weihe vænta samanlagt, at úrslitið hjá línuskipum í ár verður nakað verri enn í 2006.

### Garnaskip

Hjá garnaskipum hava seinastu árini ikki roynst nóg væl, men ársúrslitið fyri 2006 er økt við tilsamans 67,9% síðan 2002. Hesi skip hava soleiðis havt eina munandi framgongd.

Fyrstu 9 mánaðirnar í ár er miðalprísurin hjá garnaskipum øktur við 18,3%, men samlaða veiðinøgdin er í sama tíðarskeiði minkað við 11,9%.

- Samlaða veiðivirðið er minkað við 4% fyrstu 9 mánaðirnar í ár í mun til somu tíð í fjør.

- Mett verður, at samlaða úrslitið hjá garnaskipum í 2007 verður um leið tað sama sum árið fyri, sigur Rasmussen & Weihe í niðurstøðunum um gongdina hjá ymisku skipabólkunum.

### Manningarhýrur

Hyggja vit at, hvør skipabólkur hevur rindað størstu upphæddirnar í hýrum í 2006, sæst í roknskapargreiningini, at her liggja pelagisku skipini á einum fyrsta plássi eins og í 2005. Línuskip og verksmiðjutrolarar liggja ávikavist á øðrum og triðja plássi.

- Taka vit hvørt skipið sær, hava verksmiðjutrolarar goldið størstu hýrurnar seinastu árini. Annars er býtið broytt nakað hesi 5 árini, greiningarnar eru gjørdar. Bólkurin, sum verður nevndur "onnur skip", standa fyri størsta vøkstrinum hesi 5 árini. Onnur skip eru bert eini 2-3 í tali, og hesi eru tikin við eina mest fyri at fáa eina betri heildarmynd av fiskiskipaflotanum.

Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe siga, at í flestu skipabólkum eru hýruútreiðslurnar øktar seinastu árini.

### Sáttmálasamráðingar

Í løtuni eru sáttmálasamráðingar millum Føroya Reiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag og sum skilst, er her talan er rættiliga trekar og truplar samráðingar.

Semingsstovnurin hevur útsett eitt møguligt verkfall í fiskiskipaflotanum í eina viku, og ivasamt er, um partarnir í hesum tíðarskeiði megna at finna eina semju um nýggjan sáttmála.

Sosialurin hevur skilt, at stórur áhugi er fyri roknskapargreiningini, nú samráðingar eru millum partarnar, og hendan verður so tøk seinnapartin í dag, tá ið framløgufundur verður í hølunum hjá Rasmussen & Weihe.

Tað eru í fyrsta lagi Bjarni Arnason, løggildur grannskoðari og Jacobina í Lambanum, grannskoðari, sum hava staðið fyri savnanini av tølum og skjølum – og tað verða eisini tey, sum fara at standa fyri framløguni í dag.